Sveittabrot í høvuðsstaðnum:

# Havnin setti hitamet í 2003



*Mátingarnar av hitanum í høvuðstaðnum vísa, at seinastu trý árini hava øll verið yvir miðal. 2003 var tað heitasta árið nakrantíð, síðani mátingarnar byrjaðu í 1873*

**2003 var tað heitasta árið, sum nakrantíð er mált á í Havn. Miðalhitin var 7,7 hitastig, men danska veðurtænastan dugir ikki at siga, hví tað var so heitt**

VEÐUR
*Eyðun Klakstein*

2003 var eitt óvanliga heitt ár í Føroyum, og mátingarnar, sum vóru gjørdar í høvuðsstaðnum, vísa, at tað ongantíð áður hevur verið so heitt sum í fjør.

Dansk Meteorologisk Institut (DMI) hevur hevur roknað út, at miðalhitin í Havnini í 2003 var 7,7 hitastig, og hetta er hægsti miðalhitin, sum er máldur síðani 1873, tá ið hitamálingarnar byrjaðu.

– Tað var óvanliga heitt í fjør. Tað er ikki bara tí, at tað er eitt gott summar, men líka so nógv tí, at aðrir mánaðir vóru heitari enn vanligt, sigur Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur, sum metir um veðrið fyri Sosialin.

– Heistasti dagur í apríl mánaði í fjør var Skírisdagur, tá tað vóru heilti 18, 3 hitastig. Tað var sum ein góður summardagur, greiðir hann frá.

### Alsamt heitari

Mátingarnar fyri árini frá 1961 til 1990 vísa, at miðalhitin í Havn var 6,6 hitastig, men seinastu árini hevur miðalhitin fleiri ferðir verið hægri, enn vanligt var.

Í 1997 var miðalhitin 7,2 hitastig, og seinastu trý árini hava øll verið yvir miðal. 6.7 stig í 2001, 7,4 í 2002 og so 7,7 í 2003.

DMI ger onga niðurstøðu um, hví tað er vorðið heitari í Føroyum.

– Um tað er ein avleiðing av globalu hitingini er framvegis ov tíðliga at siga við vissu, heldur John Cappelen, veðurfrøðingur hjá DMI, sum hevur gjørt útrokningina av hitanum í Havn.

– Vit fylgja væl við broytingunum, men skulu eisini minnast til, at tað framhaldandi fara at verða sett veðurmet kring heim í framtíðini, sigur hann.

### Fór at vaksa við sóltímum

DMI hevur mált hita í Føroyum síðani 1873, og í dag verður hitin máldur í Havn, Mykinesi, Fugloy og Akrabyrgi.

Harafturat verður veðrið eisini mált á flogvøllinum, men tað er ikki av DMI.

Petur Skeel Jacobsen skrivaði í fjør bók um veðrið í Føroyum síðani 1875, og hann gjørdi upp, hvussu nógvir sóltímar hava verið í Havn. Har eru ábendingar um, at føroyingar hava fingið meiri sól seinastu 20 árini.

– Í fleiri ártíggjund minkaðu sóltímarnir í Føroyum, men í 1981 kom vend í, og tá fór aftur at vaksa við sóltímum, sigur hann.

### Eisini heitari í Grønlandi

DMI hevur eisini gjørt upp, hvussu hitin var í Grønlandi í fjør, og har var eisini talan um eitt óvanliga heitt ár.

Í Pittuffik í Útsynningsgrønlandi var hitin tann hægsti síðani 1948, og í Tasiilaq heitasta árið síðani 1895. Fleir aðrastaðni var eisini millum heitastu ár í Grønlandi nakrantíð.

Í bygdini Nuussuaq í Upernavík Kommunu merkir veiðimenninir, at hitin er hægri enn vanligt. Har darvar økti hitin veiðini hjá teimum, tí ísurin kemur seinni á árinum, og veðrið er óstøðugt seinni á árinum, og tí eru færri dagar, har teir kunnu veiða.

Í dag roknar DMI við millum 6 og 8 hitastig kring landið.





Til Aberdeen fríggjadag kl. 09:00, aftur til Føroyar sunnudag kl 18:15

3 dagar í Aberdeen

Frá 15 januar - 21 mars broytur Atlantic Airways ferðaætlanina soleiðis at nú er møguleiki at gera styttri vikuskiftisferðir til Aberdeen.

Patio ★★★★ Fyri hvønn í tvímanskamari Kr. 2.310

Albany Guest House ★★★ Fyri hvønn í tvímanskamari Kr. 2.110

Brentwood ★★★ Fyri hvønn í tvímanskamari Kr. 2.220

Ramada Jarvis ★★★ Fyri hvønn í tvímanskamari Kr. 2.230

Skene House Rosemount ★★★
3 rúm (6 fólk). Fyri hvønn Kr. 2.098
2 rúm (4 fólk). Fyri hvønn Kr. 2.110
1 rúm (2 fólk). Fyri hvønn Kr. 2.320

Íroknað ferð Vagar - Aberdeen og aftur, 2 nætur á hotel við morgunmati og ferðaavgjøld.

Bílegging hjá Atlantic Airways og á øllum ferðaskrivstovum.

Vanligir ferðaseðlar kunnu bíleggjast á atlantic.fo

ATLANTIC AIRWAYS
Flogvøllurin · FO-380 Sørvágur
Tel: 34 10 40 · Faks 34 10 01 · booking@atlantic.fo
www.atlantic.fo

SANSIR 355 355


# Teitur fær viðurkenning í USA

**Tvey amerikansk tíðarrit halda, at fløgan hjá Teiti Lassen var millum tær bestu útgávurnar í USA í fjør**

TÓNLEIKUR
*Eyðun Klakstein*



*Onkrir fjølmiðlar í USA halda, at Teitur Lassen gjørdi eina tí bestu fløguna á amerikanska marknaðinum í fjør*

Bæði Slant Magazine og Boston Metro halda, at útgávan hjá Teiti Lassen, Poetry and Areoplanes, var millum tær bestu á amerikanska marknaðinum í 2003.

Tá ið hugsað verður um stóru rúgvuna av tónleiki, sum verður givin út í USA á hvørjum ári, so er tað einki minni enn eitt bragd, at Teitur av summum verður taldur millum tey bestu.

Slant Magazine hevur útgávuna hjá Teiti við í sínum Topp 10 fyri 2003, og Boston Metro dregur eisini hesa fløgu fram sum eina tí besta í farna ári.

– Sum yndisligur og einsamallur singer/songwriter fær Teitur tað besta fram av troubadurum á síni fyrstu útgávu, skrivar Boston Metro millum annað um útgávuna hjá Teiti.

Teitur Lassen skal næstu vikurnar spæla kring USA



# Aftur lív á Gamla apoteki

**Telvingin um hvør skal manna landins leiðslu næstu árini er byrjað**

SAMRÀÐINGAR
*Heri á Rógvi*
*heri@sosialurin.fo*



*Sjálvstýrisflokkurin var væl mannaður til fundin fríggjamorgunin. Stjørnuskotið hjá Sjálvstýrisflokkinum, Malan Johansen, hevði fingið fundarboð. Á myndini sæst eisin nývaldi tingmaðurin hjá Javnaðarflokkinum, John Johannesen.*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Politiski telvingin á Gamla apoteki er byrjað. Langt burturi frá veljarum.

Tað er á Gamla apoteki, at landsins politiska framtíð verður avgjørd. Her tingast flokkarnir um, hvussu ein nýggj samgonga skal skipast.

Klokkan níggju fríggjamorgunin fóru Sjálvstýrisflokkurin og Sambandsflokkurin á fund við samráðingarleiðaran, Jóannes Eidesgaard, og hansara fólk.

Hetta var tað seinasta, vit fingu við, áðrenn blaðið fór til prentingar.

Hósdagin høvdu allir flokkar verið á fundi við Jóannes Eidesgaard til eitt innleiðandi prát.

Jóannes Eidesgaard sigur, at hesin fundurin er ein fundur, har tosað verður generelt um ymisk mál.

- Tað er natúrligt, at eg tosi við hesar flokkar fyrst, tá teir hava givið mær hetta mandatið, sigur Jóannes Eidesgaard.

Aðrir flokkar skulu eisini vænta at verða bodnir til fundar.

Jóannes Eidesgaard vónar at byrja rættiligar samgongusamráðingar um vikuskiftið.

Lagið var gott á fólki fríggjamorgunin. Teir flestu tingmenninir hjá flokkunum vóru við á fundinum.

# Føroyingasøga sum ongantíð áður

**Svínoyar Bjarni vil hava ein Yaris í skemtiligu útgávuni av føroyingasøgu hjá Grímu. Frumsýning verður leygarkvøldið**

SJÓNLEIKUR
*Heri á Rógvi*
*heri@sosialurin.fo*



*Katarina Nolsøe, v.m., og Kristina Hansen siga frá føroyingasøga á ein serstakan hátt á Meiarínum*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Sagt verður frá føroy-ingasøgu sum ongantíð áður á Meiarínum. Í ein góðan tíma verður ferðast runt í føroyingasøgu til deyða Trónd í Gøtu.

Alt verður sjálvandi ikki tikið við, men áskoðarin fær eitt gott innlit í føroyingasøgu.

Leikarar eru Katarina Nolsøe og Kristina Hansen. Leikstjórnað hevur Ria Tórgarð. Tær tríggjar hava saman staðið fyri leikgerðini.

Ria Tórgarð greiðir frá, at tær leggja stóran dent á søguna - at siga frá søguni.

- Vit halda, at málbólkurin frá umleiðs tíggju ára aldur og eldri hevur verið forsømdur. Føroyingasøga er ómetaliga væl egnað at siga frá og spennandi við nógvum møguleikum. Vit vilja síggja, hvussu børn taka ímóti søgum í einum sjónleikarhúsi, sigur Ria Tórgarð.

Men hetta er kortini ikki bert at meta sum ein barnaleikur. Ein familjuleikur er kanska eitt betri orð at seta á.

Leikararnir siga frá í einum serstakum málstíli. Nýtt verður nógv gerandismál. Ikki sørt av slang og meira ungdommiligum málburði fjeppast uppi í frásøgnini saman við nútíðar skemti.

Eitt nú vil Svínoyar Bjarni hava ein Yaris.

Eisini ein stórur partur av Brestiskvæðnum verður nýtt til lýsa part av søgugondini saman við øðrum kvæðum.

- Tað vildi verið ógvuliga gott, um vit kundu vakt ans fyri kvæðunum millum tey ungu, sigur Ria Tórgarð.

Eisini okkurt prik er at finna í leikinum. Miðflokkurin fær í øllum førum eina heilsan av Meiarínum í leikinum.

### Strævið lív

Tær báðar, Kristina og Katarina, sigur tað vera strævið lív at spæla hendan leikin. Tað krevur nógva orku at standa á palli og siga frá so leingi uttan stórvegis steðgir. Men tær hava vant dúgliga og vænta, at tað fer at ganga heilt væl væl.

Frumsýningin verður leygarkvøldið klokkan 19. Spælt verður síðani aftur sunnudagin kl. 16. Síðani verður spælt aftur hóskvøldið kl. 20 og fríggjakvøldið kl. 20. Fleiri sýningar verða eisini, og ætlanin er at spæla, so leingi fólk hava hug at síggja leikin.

Serligur dentur verður lagdur á at spæla fyri skúlum. Skúlarnir í høvuðsstaðarøkinum fáa fyrst møguleikan at koma á Meiaríið at hyggja. Ætlanin er eisini at fara kring landið við leikinum, sum hóskar seg sera væl at ferðast við.

Katrin Bonde hevur gjørt búnarnar til Føroyingasøgu. Ljós og ljóð hava Jónas Bloch Danielsen og Símun Pauli Hansen staðið fyri.

### Írskur leikur

Á tíðindafundi hósdagin varð eisini avdúkað, hvør tann næsti leikurin hjá Grímu verður. Talan er um leikin Vakurleikadrotningin úr Leenane, sum írin Martin McDonagh hevur skrivað. Hann er kanska mest kendur í Føroyum fyri leikin Krypilin frá Inishmaan, sum Gríma spældi á heysti 2000.

Egi Dam, sum leikstjórnar og hevur týtt henda leik, sigur, at talan er um ein leik, sum hóskar seg væl til føroysk viðurskifti.

Leikurin fer fram í 1989. Hann snýr seg um mammu og dóttur, sum er læstar fastar í hvørjari aðrari. Leikurin er fullur av spenningi og svørtum humori.

Vakurleikadrotningin úr Leenane verður frumsýnd 20. mars.




Hjartaliga takk fyri tann stuðul tit vístu Javnaðarflokkinum.
Ein serlig tøkk til tykkum mongu, sum stuðlaðu mær persónliga.

Helena